# Vesturkirkjan 25 ár



Bartalsmessudag 24. august í hesi viku, eru 25 ár liðin, síðan Vesturkirkjan varð vígd. Nú sunnudagin 27. august verður dagurin hildin við eini hátíðarligari gudstænastu, har Tórshavnar manskór eisini verður við til at seta sín serliga hátíðarliga dám á gudstænastuna.

25 ár er ikki nakað langt tíðarskeið í kirkjusøguligum høpi. Tó kann sigast, at Vesturkirkjan hevur verið fyri bæði ógvusligum hendingum og eisini fyri stórum broytingum í hesi seinastu kvart øldini.

Í tiltiknu jólaódnini 22. desember 1988 og í ódnini 14. januar 1989, fór takið so illa, at alt takið mátti skiftast út, eisini takið á torninum. Hetta var stórur og dýrur skaði, sum kortini var tryggingarmál, og nýggja takið varð lagt heldur øðrvísi á, og er nú nógv sterkari enn fyrra takið var.

Millum annað vórðu koparreimarnar smalkaðar frá 60 cm. til 42 cm. og festini eru meira, bæði til síðurnar og til endarnar á hvørji plátu.

Glasveggurin, ella galvurin vestureftir, mátti eisini tíverri skiftast út. Hann var ógvuliga vakur, men glasmúrsteinarnir í hesum stóra vindeyga brustu ógvuliga ofta, og at enda kundu teir ikki skaffast meira, og tí mátti alt vindeygað skiftast út. Tíbetur hava eingir trupulleikar verið við hesum nýggja vindeyga.

Orglið frá Frobenius og Sønner hevði at byrja við 16 stemmur, men er síðani útbygt til 29 stemmur og kann útbyggjast til 36 stemmur.

Ljóðveiðurskiftini í kirkjuni vóru als ikki góð til sang. Tað má sigast at vera harmiligt fyri eina kirkju, tí flestu kirkjufólk í Føroyum munnu vera samd um, at júst sálmasangurin er ein týðandi partur í allari gudstænastuni, tí har kunnu øll luttaka á sín hátt.

Tí varð nógv gjørt, fyri at møta um henda bága. Alt loftið ella tróðurin í kirkjuni var soleiðis gjørt, at eitt glopp uppá 11 m.m. var ímillum hvørt bretti. Hesi gloppini tilsamans gjørdu eitt op út í isolatiónina, ið var 110-115 fermetrar, og har hvarv tann mesti sangurin.

Í 1995 varð alt tjóðurin umvælt og millum 10 og 11 km, av listum vóruð høvlaðir og lagdir í hesi glopp. Hetta bøtti munandi um ljóðveiðurskiftini.

Samstundis sum nýggja p-økið heimanfyri kirkjuna varð gjørt í 1991, varð oljufýrið flutt úr kirkjukjallaranum oman í eitt høli, ið er undir trappuni, ið gongur frá p-økinum og niðan til kirkjuna. Soleiðis slapst frá at nýta kirkjutornið til skorstein, ið eisini setti ein keðiligan lit á kopartakið og kirkjan fekk eitt rúm aftrat í kirkjukjallaranum.

Eitt hjartamál fyri kirkjuráðið er enn at loysa og tað er at fríðka enn meira uttan um hesa prýðiligu kirkju. Í mong ár hevur kirkjuráðið borið ynski fram á røttum stað um at breiðka Landavegin frá brúnni og niðan í Frælsavegin soleiðis, at tað økið, ið kirkjan eigur vestanfyri kirkjuna eisini kann fríðkast til ein vakran grønan plett. Teir eru ikki ov nógvir í Havnini.

Rættará, ið rennur so møk ígjøgnum hetta lendið, er nú vorðin so rein, at hópin av sílum smýgur sær so kvikliga millum steinarnar. Fyri nøkrum árum síðani kom ein æða so fegin við sínum ungum damlandi oman eftir hesi hugnaligu lítlu á. Har er lagamanni at gera bæði hyl og hólm, ið kundu hýst villdunnum og øðrum fuglum.

Uttan iva høvdu mong verið fegin um at kunna hoykt seg niður á ein bonk í tílíkum friðarumhvørvi, ið kundi verið nevnt ein kirkjupark.

Vónandi fer hetta at bera til um ikki so langa tíð.

**Sjúrður Poulsen**
**Velbastaðvegur 36**

# Eykajáttan til bjálvingarstuðul

*Húsalánsgrunnurin hevur í løtuni uml. 110 umsóknir, ið hann ikki fær viðgjørt orsakað av tørvandi játtan, og hevur Kristian Magnussen tí lagt uppskot fram um eykajáttan fyri august*

Ólavur í Beiti

Eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2000 hevur Kristian Magnussen, løgtingsmaður, lagt fram vegna Javnaðarflokkin, tí hann metir tørvin verða stóran á at fáa meiri játtan til Húsalánsgrunnin, so hann fær nóg mikið til m.a. bjálvingarstuðulin.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Kritstin Magnussen, at á fíggjarlógini fyri ár 2000 eru 0,5 mió. kr. avsettar til bjálvingarstuðul. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina sigur landsstýrið, at »játtanin er lækkað tí tørvurin at fáa stuðul til bjálving ikki er tann sami, sum tá skipanin varð sett í gongd«.

– Hetta hevur tó víst seg ikki at verða rætt, og liggur Húsalánsgrunnurin tí í løtuni inni við uml. 110 umsóknum, ið hann ikki fær viðgjørt orsakað av tørvandi játtan. Harumframt metir Húsalánsgrunnurin, at tað fara at koma uml. 40 – 50 umsóknir afturat í ár, vísur Kristian Magnussen á.

### Løgtingið bjálvast

Og víðari sigur Kristian Magnussen, at miðaljáttanirnar til bjálvingarstuðulslán liggja um 60 – 80 túsund kr., og skulu sostatt einar 10 mió. til, fyri at Húsalánsgrunnurin hevur slætt borð.

– Nú Løgtingið verður bjálvað av nýggjum, tykist tað løgið, at samgongan ikki raðfestir bjálvingina av húsum hjá pensjónistum. Ein eykajáttan hevði gjørt trivnaðin og møguleikarnar hjá pensjónistum at búð í egnum húsum betri, og samstundis hevði játtanin verið eitt íkast til handverksvinnuna runt um í landinum.

Og mælir Kristian Magnussen til, at 9,5 mió. kr. verða veittar í eykajáttan til bjálvingarstuðul.

# Fuglafjarðar gentukór á konsertferð

*Fuglafjarðar gentukór fór á konsertferð til Aalborg og Skagen. Kórið fór at vitja ungdómskórið í Skalborg kirkju, sum hevur lagt ferðina til rættis.*

Sunnudagin sang kórið í Skagen kirkju.

Mikudagin tann 23. august kl. 19:30 fer kórið at hava konsert í Vodskov kirkju

Hósdagin tann 24. august kl. 19:30 konsert í Nibe kirkju og sama dag kl 13:30 syngur kórið í »aktivitetetssentrinum« í Fyensgade,

Fríggjadagin 25. august kl. 19:30 konsert í Skalborg kirkju.

Áðrenn farið verður, fer kórið at hava konsert í Fuglafjarðar kirkju hóskvøldið 17. august kl. 19:00.

Kórleiðari er Frits Johannesen — klaverfylgisspælið hevur Eyðun á Lakjuni og orgulfylgisspælið hevur Heðin Kambsdal, men hóskvøldið hevur Ragnar Petersen orgul fylgisspælið. Við í kórinum eru 34 gentur.



*Frits Johannesen*


PC-Koyrikort




...ein góð íløga

Nýtt skeið byrjar 18. september 2000

PC-Koyrikortið er samansett av 7 modulum, og miðja skeiðini ímóti at brúkarin lærir at nýta telduna, og teir møguleikar teldan gevur. Set teg í samband við Formula.fo, og vit geva tær eina nærri lýsing av hvat hvørt skeiðið inniheldur, og hvat tú kannst vænta av skeiðunum.

**Grundleggjandi kunningartøkni**
Kunningartøkni yvirhøvur
Stýriskipanin í eini teldu

**Vanligastu forritini**
Tekstviðgerð/Word
Rokniark/Excel
Dátugrunnur/Access
Framløga/Power Point

**Samskifti**
E-postur, internet v.m.

formula.fo
Tel: 311115
Fax: 317115
Stiðjagøta 5 & 11
100 Tórshavn

t-post: skeid@formula.fo
heimasíða: www.formula.fo




# Flakaframleiðsla á Skála

**Skipasmiðjan á Skála er fyri aðru ferð biðin um at samla ein av aliflakunum, sum í smærri lutum eru komnir úr Póllandi. — Nú eru vit um at koma á lagið og tí gongur skjótari, sigur Alfred Hummeland, tekniskur leiðari. Og tí er heldur ikki óhugsandi, at teir fara at taka av, um teir vera bidnir enn einaferð**

Sveinur Tróndarson

Út fyri grótkastið á Skála liggja nakrar boyur og flóta. Í fyrsta umfari sær tað út sum um onkur fiskibátur hevur verið óryggjasligur og kasta gamalt rusk á fjørðin.

Men tað er ikki orsøkin. Verður hugt nærri, so sæst, at tað er skil í galskapinum kortini. Boyurnar eru lagdar á fjørðin við vilja, og endamálið við teimum er at skerma av. Vakna eyga fangar so virksemið á bryggjuni innanfyri, og so byrja brikkarnir so smátt at fella upp á pláss.

Tað stutta av tí langa er, at menn frá Skipasmiðjuni á Skála eru í fer við at samla ein risastóran aliflaka — talan er um tíggju aliringar — til Vestlax.

### Altjóða samstarv

Tað, sum gongur fyri seg á Skála er í veruleikanum ein partur av einum trílanda samstarvi, millum norðmenn, póllendingar og føroyingar. Norðmenn eiga tekningarnar, póllendingarnir hava gjørt sektiónirnar og føroyingarnir seta tær saman til eina øgiliga stóra alistøð.

Tað er norska fyritøkan Procean, sum eigur uppskotið til alistøðina, og tekningarnar. Teir vilja kortini ikki gera alistøðina sjálvir, tí tað er ov dýrt, og tí lata teir lutirnar gera í Póllandi. Ein roynd var gjørd við at samla alistøðina í Póllandi og síðani sleipa hana til Føroya, men tað loysti seg ikki. Støðin fekk so harða viðferð á ferðini til Føroya, at mett var rættast, at fáa eina føroyska fyritøku at samla sektiónirnar, sum framhaldandi verða gjørdar í Póllandi.

Tað er tað, sum gongur fyri seg á Skála, og tað er í veruleikanum aðru ferð, at skálamenn ”byggja lego” fyri norðmenn og póllendingar.

Fyrstu ferð gekk heldur enn ikki striltið, men hóast tað, hættaðu teir sær undir tað enn einaferð, og hesaferð gongur nógv betri, greiðir tekniski leiðari á Skipasmiðjuni á Skála frá.

### Krevjandi uppgáva

Alfred Hummeland greiðir okkum frá, hvussu verkætlanin hongur saman og sigur, at parturin hjá skipasmiðjuni avmarkar seg til at vera undirleverandørur til norska høvuðslataran Procean.

- Tann fyrsta alistøðin av hesum slagnum var gjørd og savnað á pólskari smiðju, men frástøðan til Føroya er stór og veðurlíkindini ikki altíð til vildar heldur, og hóast hon ikki fekk skaða á vegnum heim, so fór túrurin ikki væl við alistøðini. Tí vórðu vit spurdir, um vit vóru áhugaðir í at vera við í verkætlanini, sigur Alfred Hummeland.

Tað hevði skipasmiðjan á Skála. Men tað var ein trupul uppgáva, skilst.

- Vit høvdu ikki fingið nóg góða frágreiðing um, hvussu vit skuldu fyrihalda okkum, og tað hevði sína ávirkan á, at tað tók ov langa tíð at loysa fyrstu uppgávuna. Men tað hevur ikki fingið norska framleiðaran at halda seg vekk, sigur hann.

Alfred leggur afturat, at ein orsøk var, at menn vóru ov neyvir sammett við tað, sum neyðugt er, og tá tað var fingið upp á pláss, so gekk skjótari.

- Menninir eru vanir við at alt skal passa upp á millimeturin og tí arbeiddu teir eisini út frá fyrstu ferðina, tí tók tað heldur drúgva tíð. Hesaferð var innleiðandi frágreiðingin betur. Umboð frá norsku fyritøkuni hava verið her og lagt okkum lag á, og tí gongur tað skjótari í dag, sigur hann.

### Bíliga arbeiðsmegin

Tá vit spyrja Alfred, um tað er ein møguleiki, at skálamenn fara at yvirtaka pólsku sveisiarbeiðið eisini, sigur hann avgjørdur nei.

- Tað kemur ikki upp á tal. Ikki tí, at vit kundu saktans loyst uppgávuna, men tað er so nógv bíligari í Póllandi enn her á landi, at tað er óhugsandi, at vit fara at gera sektiónirnar her á landi, sigur tekniski leiðarin.

Og tað er undrunarvert, at tað skal vera bíligari at gera sektiónirnar í Póllandi, síðani senda tær heim til Føroya í smáum — og sera tungum — lutum, til at seta saman sum eitt byggisett her.

- Tað sigur alt. Tað vísir, hvussu stórur munur er á lønarlagnum í báðum londunum. Nú hava vit fingið ta uppgávuna at seta sektiónirnar saman, og tað uppgávuna megna vit væl og virðiliga, sigur Alfred.

Sambært avtaluni skal alistøðin verða liðug fyrst í næsta mánaði og tað verður hon. Vestlax skal seta fisk út í støðina í næsta mánað, og tekniski leiðarin á Skipasmiðjuni á Skála væntar ikki at tað vera nakrir trupulleikar at røkka tí málinum.

- Vit hava fjúrtan dagar til ta tíð, og manningin, sum setir hesa støðina saman, er nú komin á lagi, og til dømis kunnu vit nevna, at teir brúktu tríggjar dagar til tveir ringar. Nú mangla tvær ferðir tveir ringar, so tað er eingin vandi, sum eg dugi at síggja.



*Tað er eitt ordans djór av einum aliflaka, sum teir eru í ferð við at seta saman á Skála. Tá hann er liðugur, verður hann umleið 140 metrar til longdar og vigar eini 200 til 250 tons deyðvekt* *Mynd: Sveinur Tróndarson*

### Tungur burður

Alistøðin, sum skálamenn eru í ferð við at stykkja saman er eingin lítil verkætlan. Hon er einar 140 metrar til longdar og vigar »í leysari vekt” ímillum 200 og 250 tons. Tá er skilligt, at tey, sum á ein ella annan hátt vara av støðini, vilja hava hana samlaða undir tryggum umstøðum, soleiðis at tað verður stytst møgulig frástøða til hagar alistøðin skal liggja.

Tá vit spyrja tekniska leiðaran, um tað er ein gevandi vinna, sum teir nú eru farnir undir, so er hann ikki so tíðindafróður, men sigur kortini, at teir neyvan høvdu farið undir verkætlanina um so var, at teir einki fingu burturúr.

- Sjálvandi fáa vit eitt avkast. Tað sigur seg sjálvt, at vit annars ikki vóru farnir undir hetta.

Men er so kanska ein framtíðar inntøkumøguleiki í útflutningi av slíkum, spyrja vit.

- Nei, ikki til útflutnings. Tí trúgvi eg ikki. Men tað er ikki óhugsandi, at vit siga ja, um so er, at vit verða bidnir aftur, tá ein onnur alistøð skal setast saman, sigur Alfred Hummeland at enda.


## Tøting søkir eftir fólki til sølubúðina

Til sølubúð/avgreiðslu okkara søkja vit eftir einum fólki (m/k) at byrja skjótast gjørligt. Talan er um hálvtíðarstarv seinnapartar (20 tímar pr. viku). Til tíðir má tó roknast við, at arbeitt verður meira enn 20 t./ viku.

**Arbeiðið:**
- Avgreiða viðskiftafólk í sølubúðini
- Telefonansing, ordramóttøka
- Hjálpa til við avskipan av vørum
- Fakturering og smærri bókhaldsuppgávur

**Vit vænta:**
- At tú er fyrikomandi og hevur royndir innan søluarbeiði
- At tú hevur royndir við telduarbeiði
- At tú kennir nakað til fakturering/bókhald
- At tú er sjálvstøðug og fleksibul í tínum arbeiðslagi
- At tú hevur kunnleika til enskt/týskt

**Vit bjóða:**
- Eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv við ymsum arbeiðsuppgávum
- Eitt umhvørvi við støðugari nýskapan og menning
- Løn eftir avtalu

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hallberu Ó. Kristiansen á tlf. 44 10 20 ella 44 15 51. Skrivlig umsókn verður at senda innan 1. september 2000 til:

Töting

**Tøting p/f · 510 Gøta**
**Tel. 441020 · Fax 442091**
**e-mail: toeting@toeting.com**

Tøting p/f er eitt virki í støðugari menning, sum designar, framleiðir og selir tógv og pløgg úr 100% ull til føroyska og útlendska marknaðin. Á virkinum arbeiða uml. 12 fólk. Virksemið er í ávísan mun merkt av vertíðarsølu, tvs. serliga nógv er at gera um summarið og fram ímóti jólum.